

# Umhvørvisleiðari

## til Klaksvíkar Kommunu

Umhvørvisøkið gerst eitt alsamt størri og týðandi arbeiðsøki hjá kommununi, og almenn krøv til reinari framleiðslu, lívsgóðsku, betri umhvørvispolitikk v.m. hava ført til, at kommunan hevur avgjørt at leggja hetta arbeiðið í eitt toymi undir Teknisku Deild.

Við hesum vil umsitingin í Klaksvíkar kommunu lýsa eftir einum umhvørvisleiðara at byrja sum skjótast.

Toymið skal í høvuðsheitum stuðla uppundir, at Klaksvíkar Kommuna kemur at ganga undan sum ein umhvørvisvinarlig og heilsutrygg kommuna, við ítøkiligum verkætlanum og neyðugum samstarvi við avvarðandi myndugleikar bæði í Føroyum og altjóða. Málið við býarfríðkanini skal vera: *reinur og fríður, Klaksvíkar býur.*

Høvuðsuppgávurnar verða at samskipa heilsu- og umhvørvisliga arbeiðið í kommununi, og at umsita og menna grønu økini. Ein fær til uppgávu at fyriskipa kunning og tiltøk v.v. kommunala umhvørvisarbeiðnum. Umhvørvisleiðarin skrásetur umhvørvisøkið og ger arbeiðsætlanir, harumframt samstarvar hann við kommunalar og interkommunalar umhvørvisstovnar.

Umhvørvisleiðarin hevur um hendi alt viðkomandi heilsufrøðiligt eftirlit og virkar sum skrivari í Heilsu- og umhvørvisnevndini.

Tú skalt hava áhuga í heilsu og umhvørvi, og hevur hegni at leiða og seta tiltøk í verk og at gjøgnumføra tey. Harumframt dugir tú væl at samstarva, og ert eyðkend/ur av kreativari hugsan. Og um tú hartil hevur viðkomandi útbúgving og royndir á nevndu arbeiðsøkjum, ert tú kanska persónurin, ið vit leita eftir.

Løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og avvarandi yrkisfelag. Fleiri upplýsingar fáast við at venda sær til býarverkfrøðingin, Hera Hammer, ella Gunnleyg K. Dánjalsson tlf. 41 00 00.

Umsóknir, saman við prógvi og møguligum viðmælum v.m., verða at senda til:

KLAKSVÍKAR BÝRÁÐ
Postsmoga 2 · 700 Klaksvík

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 30. mars 2007.

Klaksvíkar Kommuna | Nólsoyar Pálsgøta 32 | FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 | Fax. 410001 | klaksvik@klaksvik.fo | www.klaksvik.fo

---

**TOTAL**
**Klaksvík · tel 455354**
Leygardagin er opið til kl. 23

**BAMSAN**
**Tórshavn · tel 322550**
Leygardagin er opið til kl. 17

**BROS**
**Runavík · tel 447630**
Leygardagin er opið til kl. 17



VERO MODA

ICHI

SISTERS

**ÓKEYPIS**
*gjøgnum tunnilin leygardagin*
*Opið til kl. 23*




newborn
name it
EXIT
3-10 ár

Fransa)
3-8 ár

Jo-Ha
undirklæði

phink
GENTUR
8-16 ár

PH
DREINGIR
8-16 ár

Fransa)
GENTUR
8-16 ár

Freeze)
DREINGIR
8-16 ár

BEST OG BÍLIGAST